## YVIRLÝSING: 23.10.2007

Havnar Handverkarafelag lýsir her sín fulla stuðul til Havnar Arbeiðsmannafelag í sambandi við málið um portørar og ambulansu-starvsfólk.

Fakfeløg eiga eins og Havnar Arbeiðsmannafelag at stríðast fyri vunnum rættindum og økjum. Í hesum føri hevur Havnar Arbeiðsmannafelag havt samráðingarrættin í meiri enn 40 ár.

Tí mæla vit øllum fak-feløgum í Føroyum til at standa saman um ikki at gera seg inn á øki, har annað fakfelag hevur havt sáttmála í áravís.

Havnar Handverkara-felag heldur tað eisini vera sera ósømiligt, at umboð fyri portørar og ambulansufólk í Útvarpinum tosa niðursetandi um formannin í Havnar Arbeiðsmannafelag, tá hesin ikki er til staðar og tí ikki fær vart seg.

Tað er átaluvert og stórt spell, at Starvsmannafelagið leggur upp til spjaðing og stríð innan føroysku fakfelagsrørsluna. Vit heita tí staðiliga á Starvsmannafelagið um at leggja dent á samstarv heldur enn spjaðing.

Í hesum føri er talan um sáttmálaøki hjá Havnar Arbeiðsmannafelag, tað eigur ongin ivi at vera um tað.

Tórshavn, hin 23. oktober 2007

**Vegna Havnar Handverkarafelag,**
**Eli Brimsvík, formaður**

# Eitt land ella 18 oyggjar?

PETUR Í GONG

Allan týsdagin, og dagar-nar uppundir, hava vit hoy-rt alskyns grundgevingar fyri hví vit skulu varveita valdømini og yvirumboðan av minnilutum. Men satt at siga, so hevur megin part-urin av hesum grundgev-ingum einki sum helst við málið at gera.

Onkur tosaði um klan-stríð og valskipanir so langt burturi sum í Afgan-istan, valdømi í Bretlandi og annað slíkt, meðan aðrir tosaðu um alt Kongaríkið Danmark sum eitt valdømi. Enntá undirsjóvartunnlar skuldu vevjast uppí málið. Fullkomiliga óviðkomandi.

Sum teimum allarflestu kunnugt, snýr tað seg ein-ans um, at vit í dag hava stórar skeivleikar í okkara valskipan. Summastaðni sleppa tinglimir inn fyri líti og lætt, meðan aðrastaðni mugu upp í tríggjar ferðir so nógvar atkvøður til. At hetta er skeivt, er so sjálv-sagt, sum tað kann vera fyri ein og hvønn.

Fyri tað skal ikki sigast, at trupulleikin ikki hevði kunna verið loystur á ann-an hátt. T.d. við at umskipa valdømini. Harundir kan-ska lagt Suðuroynna og Sandoynna saman, og umrokna alla umboðanina um alt landið, so hon svar-aði betur til fólkatalið í einstaka valdøminum. Ella kanska okkurt heilt triðja.

Men tað er júst hetta, ið ongantíð hevur borið til. Alt tos um broytingar hev-ur verið avhøvdað í føðing-ini. Tí er eingin annar møguleiki enn tann eina bastanta loysnin, ið er at skipa Føroyar sum eitt valdømi. Einki tos, og ongar tingingar, tí tær bera tíanverri ongan veg kortini. Her má tað vera alt ella einki.

Hinvegin er trupult at fáa eyga á, hvør illgerðin er. Tað ljóðar á nógvum mótstøðufólki, sum um onkur hevur stolið nakað frá teimum. Men hava tey yvirhøvur mist nakað? Allir veljarar sleppa at velja júst sama valevnið sum við síðsta val, treytað av, at viðkomandi stillar upp sjálvandi. Umfram hetta, hava veljarar nú eisini møguleika fyri at velja onkran heilt annan uttanfyri teirra vanliga valdømi. Hví er tað so ræðuligt, at tey hava fingið hesi víðkaðu rætt-indi? Kunnu vit rokna við, at tey tilvitað koma sær í óføri av hesum, soleiðis, at vit mugu verja tey ímóti sær sjálvum? Ja, ikki er lætt at finna nakra skilagóða meining í hesum.

Heldur man henda nýggja skipanin fara at verða okkum til mikið gagn. Millum annað rokni eg við, at prosentvísa umboðanin av kvinnum á tingi við einum valdømi man fara at nærkast prosentvísa atkvøðu-talinum hjá sama kyni.

Ein annar kærkomin vinningur er eisini, at Føroyar við hesi nýggju skipanini gert ein eind, heldur enn ein samling av klandursskotum. Teir breiðu gákarnir fara ikki longur at fáa nakað burtur úr at niðurgera tey í grannavíkini. Tey eru jú eisini veljarir.

# Vegaføringin um Leirvík

POUL ANDRIAS JOENSEN
bygdarráðslimur
Leirvík

Aftursvar til Kára P. Højgaard, løgtingsmann

**Góði Kári,**
Sjálvandi eru nógv onnur atlit at taka enn Kyoto og orkunýtslu, tá ið høvuðs-farleiðin um Leirvík skal leggjast. Eg skal nevna nøkur her, sum koma bein-leiðis í konflikt við upp-skot títt um høvuðsfarleið um Leirvík:

Tað er bert ein útbygging-armøguleiki í Leirvík, og tað er niðaneftir

Vegurin kemur beint ígjøgnum viðarlundina

Møgulig fornminnir fara fyri skeyti

Vegur fer beint ígjøgnum byggilendi

Bygdin verður deild í tvey

At leggja vegin har niðri hevur sjálvandi eisini sínar negativu avleiðingar, treyðugt so. Men hóast alt eru bert fá sethús har, umfram at vinnan seinastu trý árini hevur fingið áleið 20.000 m2 meira at ráða yvir, og sostatt hevur góðar útbygg-ingarmøguleikar har niðri kortini.

Tá ið talan er um Kyoto, nyttar lítið at tosa um gaml-ar tíðir og gomul minnir. Nei her mugu vit øll skifta kós og læra okkum at hand-la í dag heldur enn í morg-in, skulu vit náa málsetn-inginum.

Sjálvur haldi eg ikki, at eg eri komin við einum tómum pástandi um, at $CO_2$ útlátið meira enn tví-faldast við at leggja høv-uðsfarleiðina omanfyri bygdina. Haldi meg heldur hava víst á ein verðuleika, sum ikki er so torførur at rokna uppá – verður vegur-in lagdur í erva, verður hann áleið 1 km longri enn har niðri, sum gevur oman-fyri 50% í øktum $CO_2$ útláti, meðan nógv orka eisini fer til hæddarmunin á uml. 70 metrar og eyka kavarudding v.m.

Dugi ikki at síggja, hvussu tú kanst samanbera nýggju vegaføringina millum Skála - Strendur og Runavík – Gøtueiði við títt egna uppskot um vegaføring um Leirvík. Báðar hesar farleiðir liggja omanfyri alt byggilendi á staðnum, meðan títt egna uppskot um Leirvík, liggur ígjøgnum besta byggilendi í bygdini, viðarlund og møgulig fornminnir. Eisini liggja báðir portalarnir í láglendi og virkar tað tí púra burturvið at fara niðan í brekkuna bert fyri at venda omanaftur. Tá talan er um vegastrekkið Skála – Strendur varð henda loysnin eisini samtykt og arbeiðið byrjað áðrenn 28. september ella tann dagin løgtingið samtykti Kyoto-sáttmálan.

Haldi tað er óheppi, at málið aftur skal í løtingið, nú ein loysn hómast fyri framman, og arbeiðið har niðri í bygdin kann byrja um stutta tíð. Haldi heldur ikki at tað er rætt at trýsta eina vegaføring omanfyri bygdina ígjøgnum, beint ímóti fólkaviljanum í Leirvík. Tá hevði tað sømt seg betri hjá løgtinginum at heitt á Leirvíkar bygd-arráð um at skipa fyri eini vegleiðandi fólkaatkvøðu, áðrenn tingið viðjørdi málið aftur.

Havi eisini, eins og Kári P. Højgaard, seinast hálva árið billað mær inn, at ætlanin hjá kommununi var at leggja høvuðsvegin um Leirvík uppi á Brekk-um. Men sambært nýggja-stu tekningini á heimasíð-uni hjá kommununi, er vegurin fluttur frá uppi á Brekkum og umleið 30 m longur oman í sjálva brekkuna. Hvat sigur Kári P. Højgaard til tað?

Hóast eg ikki eri samdur við Kára P. Højgaard um vegaføringina um Leirvík, haldi eg at Sjálvstýrisflokk-urin annars førir ein sera skilagóðan umhvørvis-politikk, og eiga tit alt rós uppiborið fyri tað.

# Krepputiltøk heldur enn langtíðarætlanir

MAUD WANG HANSEN



**Tá landið hevur brúk fyri tær**
Nú er tað aftur vorið í lagi at arbeiða hjá tí almenna til tú til fyllur 70 ár.

Alt gott um tað, men hvør er veruliga orsøkin til at landið nú hevur brúk fyri fólki yvur 67 ár? Fyri fáum døgum síðani var tað knívskorið, at eingin slapp at halda á framm í sínum stavið, eftir at tey eru fyllt 67 ár.

Eg havi stóra virðing fyri teimum, sum orka at arbeiða við t.d. menniskjum líka til tey fylla 67 ár, so sum pedagogar og hjálparfólk, ið arbeiða í barnagarði ella innan serøkið, tí hetta er ikki nøkur lætt uppgáva. Arbeiðsuppgávan er krevjandi bæði kroppsliga og sálarliga og lítil og eingin førleikamenning er skipað fyri hetta økið.

**Manglandi arbeiðsmegi er orsøkin**
Fyri mær at síggja er eing-in fakpolitisk ætlan í hesu nýggju avgerð. Hetta er ein neyðloysn tí landið nú manglar arbeiðsmegi.

Við vanda fyri at koma at skera øll yvur ein kamb, vil eg staðfesta, at eg veit at starvsfólk eru øll ymisk og tað er ymiskt hvørji krøv verða sett til tann ein-staka, og hvussu stóra orku tú hevur at røkja eitt 40 tímar starv líka til tú fyllur 70 ár.

Er nøkur kanning gjørd av innihaldinum í almennu arbeiðsuppgávunum?

Og hvat við teimum sum longu hava pakkað saman, teimum sum ikki var brúk fyri, áðrenn politiski mynduleikin knappliga kom í tankar um at hann hevði brúk fyri teimum alíkavæl.

**Kanningar vísa tørvin**
Ein kanning átti at verið gjørd, sum vísir tørvin á útbúgving, sum lýsir hvørji starvsøkir serliga koma at mangla starvsfólk, hvørjar førleikar tørvur er á og hvussu ein skipað førleika-menning kann tryggja eina famhaldandi góða tænastu.

Eg kann her vísa á eina kanning, sum var gjørd í fjør, um hugburðin til eldri starsfólk á pedagogiskum arbeiðsplássum. Hendan kanning vísti, at starvsfólk í stóran mun mettu tað vera neyðugt at ein skipað før-leikamenning fer framm á pedagogiskum arbeiðs-plássum og at møguleki skal vera fyri ørvísi arb-eiðsuppgávum til eldri starvsfólk. Ein stórur part-ur segði seg eisini ynskja at sleppa niður í tíð og ynskir at pensjónsaldurin fer niður. Tey halda tað vera ov strævi at arbeiða sum pedagogur ella hjálp-arfólk til ein fyllur 67 ár.

Hetta stendur tí í bein-leiðis ansøgn við nýggju útmeldingarnar.

Eg haldi tað vera sera umráandi at gera lýsingar av innihaldinum í arbeið-num innan tað almenna og at tryggja ungum sum eldri ein skipaða førleikamenn-ing alt arbeiðslívið.

Sosialurin
Lesið Sosialin - so eru tit við